# Bloggarar alsamt størri vald

Hesar dagarnar, Copenhagen Fashion Week hevur verið, hevur eitt kjak stungið seg upp um fenomenið mótabloggarar, sum seinastu tíðina eru blivnir ein fastur partur av mótasýningunum



**Gala Gonzales er ein av heimsins kendastu bloggarum, og hon bloggar m.a. á Vogue España. Her er hon til showið hjá Barbaru í Gongini við einum øðrum heimskendum bloggara, Pelayo Diaz, har tey høvdu fingið sess á fresmtu røð.**

**Gala Gonzales hevði upprunaliga ikki ætlað sær at komið til Keypmannahavnar á mótavikuna, men stjórin hjá Georg Jensen ringdi til hennara og bjóðaði henni at koma á mótavikuna og at rinda henni bæði ferð og uppihald, um hon bert vildi fara til onkur ávís show, sum Georg Jensen var høvuðsstuðul hjá. Tá hon fekk alt rindað, kundi Gonzales ikki siga nei, og tískil hevur hon seinastu dagarnar bloggað um skandinaviskan móta úr Keypmannahavn.**

Kjakið snýr seg um, hvørt mótabloggarar gera mótaheiminum skaða ella gagn.

Mótabloggararnir eru ótalligir, men tað eru nakrir, sum eru betri enn aðrir og sum verða meiri lisnir. Hesir heilt vælumtóktu bloggarnir eru ótruliga valdsmiklir, tí teir náa fólki í øllum heiminum. Tað er jú ein lættur, ómaksleysur og bíligur háttur at fylgja við í hvat rørir seg í mótaheinum. Tú skalt bert klikkja teg inn á ein tílikan mótablogg, har onkur savnar alt tað mest áhugaverda saman fyri teg, og tær nýtist ikki at gjalda fyri tænastuna.

Tí mugu teir bestu mótabloggarnir metast at hava eins stórt vald og tey størstu mótamagasinini.

## Gott ella ringt?

Eitt prógv um hetta valdið er, at teir bestu mótabloggararnir nú, sum nakað nýtt, verða bodnir við til stóru mótashowini, og teir fáa tey bestu plássini undir liðini á víðagitnu mótajournalistunum.

– Gott fyri mótan og sniðgevararnar, siga summi. Við bloggarunum fáa sniðgevararnir jú ein eyka pall at standa á, so teir kunnu náa fólki, ið annars neyvan høvdu frætt um teirra arbeiði. Øll umtala er reklama, og tí eiga sniðgevararnir sjálvandi at taka atlit til bloggararnar og gera sær dælt av teimum á fullbesta hátt, m.a. við at seta teir á fyrstu røð til showini.

– Katastrofalt fyri mótan, siga summi. Tað kann ikki vera rætt, at ein og hvør 15 ára gomul genta við eini teldu og einum bloggi kann kalla seg fashionista, og á tann hátt diktera øðrum, hvat er smart. Mótajournalistarnir hava útbúgvingar, teir hava verið í fakinum í áravís og hava bygt eina servitan upp. Teirra vanda eyga dugir at hyggja at mótanum og mótaheiminum við røttum perspektivum, og teir hugsa ikki bert um, havt teir sjálvir halda vera kul. Og fær ein sniðgevi vánaligt skoðsmál frá einum bloggara, sum ikki veit hvat hann tosar um, men allíkavæl hevur so stórt vald, kann tað fáa ógvuliga harmiligar avleiðingar.

## Merkini varnast bloggararnar

Hvussu er og ikki, so hava fleiri av kendu merkjunum fingið eyguni upp fyri mótabloggarunum, tí marknaðarføringsvirðið er so stórt. Umsetningurin veksur sama dag, sum tey fáa jaliga umtalu á einum av kendastu bloggunum, og tí hava fleiri merkir gjørt stuðulsavtalur við bloggarar um, at senda teimum nýggja vøru og pening, um teir verða nevndir við jaligum orðum afturfyri.

Hetta ger, at mótabloggarar nú fara frá at vera amatørar við einum frítíðarítrivi til at vera amatørar við einum professionellum arbeiði.

Brennandi spurningurin er so, um tað er gott ella ringt.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*
*myndir: Beinta Haraldsen*

# Pressan stórur partur av mótavikuni

Yvir fimmhundrað pressufólk úr øllum heiminum vóru í Keypmannahavn í farnu viku, tá Copenhagen Fashion Week vísti verðini, hvat norðurlendsk sniðgeving er

Hóast sniðgevar, stylistar og modellir spílaðu seg út og vístu seg frá síni allarbestu síðu, so var alt stríðið lítið vert, um ikki fotografar og journalistar eisini gjørdu sítt arbeiði til lítar.



*Á pallunum, sum eru settir av til myndafólk, er mangan trongligt, og tað snýr seg um at vera í góðari tíð, fyri at fáa tað besta plássi. Kappingin um at fáa bestu myndirnar er nevniliga hørð.*

## Mugu hava røttu fólkini at hyggja

Tað eru nøkur mótabløð og -magasin kring heimin, ið hava størri ávirkan enn hini. Serliga eru nøkur mótabløð í Italia og í USA, sum hava serliga tyngd, og teirra orð er at kalla lóg innan mótaheimin. Tað, tey taka upp og skriva jaliga um, fær ómetaliga stóran týdning fyri framtíðina hjá teimum sniðgevunum, ið verða umrøddir.

Tí er tað av alstórum týdningi fyri skandinaviskan móta, at tað eru tey røttu fólkini, ið koma og hyggja. Men tað tykist ikki vera nakar trupulleikar at lokka journalistar til Copenhagen Fashion Week.

Fyrstu ferðirnar, at Copenhagen Fashion Week varð hildin, vórðu allir teir týdningarmiklu mótaskribentarnir bodnir til Keypmannahavnar og fingu bæði ferð og uppihald rindað. Tað var Danish Fashion Industry, ið er felagið hjá flestu sniðgevunum, ið skipaði fyri hesum.

Men nú vikan hevur verið hildin nakrar ferðir, er ikki longur neyðugt at bjóða miðlunum uppihald og ferð – nú koma teir av sær sjálvum.

## Áhugin vindur uppá seg

Eva Kruse er stjóri í Danish Fashion Industry, og hon sigur, at danska mótavikan er høgt í metum hjá mótafólki kring allan heim.

– Nú gjalda vit bara fyri teir allar størstu mótajournalistarnar, sum vit halda hava størstan týdning. Men hóast bert fá verða bjóðað, so eru yvir 500 pressufólk úr øllum heiminum í Keypmannahavn hesa vikuna, so tað er alstórur áhugi.

– Fyrr var tað eisini so, at tað kanska vóru assistentarnir hjá skribentunum, sum komu út til ymsu showini, men nú síggja vit, at tað eru skribentarnir sjálvir, sum koma, og tað er eitt tekin um, at tað, sum verður sýnt fram hesa vikuna, er vert at síggja.

## Fáa bestu plássini

Ein og hvør kann ikki koma inn av gøtuni og til eitt mótashow. Teir kendastu skribentarnir og stylistarnir verða bodnir til ymsu showini, og hinir journalistarnir mugu skriva til sniðgevan og biðja um at fáa eina innbjóðing. Duravørar standa síðani og krossa av, tá tú kemur til showið, og vísa tær hvar tú skal sita – ella standa.

Týdningarmestu nøvnini sita á bestu plássunum, og nøvnini eru skrivað á stólarnar, so eingin ivi er um, hvør situr hvar. Tað eru tó fleiri show, har øll ikki fáa sess, og fleiri mugu standa.

Men tað ger pressan gleðiliga, tí tað, sum fer fram á mótavikuni í Keypmannahavn, er nú á so høgum støði, at tað stingur kósina fyri mótan út í korti, og mótaheimurin bíðar spentur at síggja, hvønn veg leiðin ber.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*
*Myndir: Beinta Haraldsen*